# Silvurdystur í Klaksvík

**Tað líkist einum dysti um silvurplásið í grundspælinum, tá Neistin hóskvøldið vitjar Stjørnuna**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Hóskvøldið verður eitt slag av toppdysti, tá Stjørnan á heimavølli tekur ímóti Neistanum.

Verður sæð burtur frá einsamalla oddaliðnum úr Vestmanna, so eru tað júst hesi bæði, sum hava gjørt mest um seg í grundspælinum, og í nógvar mátar tykist dysturin hóskvøldið verða ein dystur um annað plássið á stigatalvuni.

Tá liðini hittust í fyrra dystinum í grundspælinum, vann Stjørnan ein sannførandi sigur, og mugu tær tí metast sum favorittar undan hesari uppgerðini.

Tann leikluturin gerst heldur ikki minni av, at avrikini hjá Neistanum seinastu vikurnar hava verið alt annað enn sannførandi. Stigini hava tær bláu út Havn tó fingið burtur úr hesum dystum, og tær hava áður víst, at tær væl eru førar fyri at stríðast, tá tørvur er á tí, so lætt verður tað neyvan hjá heimaliðnum.

Dysturin er settur at byrja klokkan 18.15.



*Í fyrra dystinum móti Neistanum vann Stjørnan sannførandi, og tær mugu eisini metast sum favorittar hóskvøldið*

# HB leitar uttanlands

**Tað tykist sannlíkt, at havnarfelagið fer at fáa útlendskan styrk á miðvøllinum komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast HB í fjør hevði eitt søguliga vánaligt ár, so tykjast teir í sigursvanda havnarfelagnum als ikki hava mist mótið um, at liðið eisini í framtíðini fer at hava ein leiklut í føroyska oddinum



*Hóast hann ikki vil siga nakað ítøkiligt um ætlaða styrkin við útlendskum leikara, so avsannar HB-stjórin á ongan hátt tíðindini*

## Rumenskan miðvallara

Sum so var árið í ár eisini nakað serligt, tí tað vóru fyrst og fremst ein ørgrynna av skaðum, sum forðaðu liðnum í at røkka longur upp á stigatalvuni.

Flestu av skaddu leikarunum eru nú aftur tøkir, og nýta teir vetrarfrítíðina til at fáa venjingarstøðuna upp aftur á nakað, sum líkist fyrstudeildarstøði.

Onkur leikaraskifti hava verið, oiðið er um at taka skap, men líkt er til, at leiðslan í felagnum framvegis leitar eftir seinastu prikkunum til puslispælið.

Millum annað hevur ljóðað, at tá rumenski venjarin, Ioan Geolgau, kemur aftur úr vetrarfrí, fer hann at hava ein landsmann við sær, og hesi tíðindi verða als ikki avsannað av leiðsluni í felagnum

- Tað er einki endaliga avgjørt, men tað er klárt, at vit altíð leita eftir møguleikum at styrkja um liðið, sigur stjórin í P/F Havnar Fótbóltur, Steinfinnur Mittelstein.

Hann váttar eisini, at nakað er um tosið um útlendska leikaran, men meira enn tað sama, fæst ikki burtur úr prátinum.

Sum skilst, skal talan annars vera um ein rumenskan miðvalllara, men meira verður helst at frætta um hetta, tá feløgini verulíga fara undir aftur venjingarnar eina ferð í komandi ári.

J. F. Kjølbro Heilsøla Pf.

40 ár

Við tað at J. F. Kjølbro Heilsøla í ár er 40 ár, bjóða vit viðskiftafólki okkara inn á gólvið, til ein

góðan kaffimunn

Fríggjadagin 30. nov. millum kl. 15-17

JFK J. F. Kjølbro Heilsøla Pf.
471111 • www.kjolbro.com

# Hjalgrím ivast

*Evnaríki klaksvíkingurin, Hjalgrím Elttør, hevur enn ikki tikið støðu til, hvar hann skal spæla fótbólt komandi árið*

**Tað er framvegis óvist, hvat Hjalgrím Elttør fer at spæla fótbólt komandi ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



Seianstu tíðina hevur nógv verið gitt og tosað um, hvar fótbóltsframtíðin hjá unga KÍ- og landsliðsleikaranum, Hjalgrím Elttør, man liggja.

Hjalgrím skrivaði fyri tveimum árum síðani undir sáttmála við KÍ, men hesin er nú runnin út, og tí stendur tað spælaranum frítt at velja, hvørt hann framhaldandi fer at spæla við barndómsfelagnum, ella um onnur feløg skulu fáa gleði av evnum hansara.

Tað eru serliga meistararnir úr B36, sum hava verið nevndir sum møguligur avtakari av klaksvíkinginum, men hóast samband hevur verið millum partarnir í eina tíð, so hevur Hjalgrím enn ikki tikið nakra støðu í hesum.

- Jú, tað er rætt at eg havi tosað við B36 um at fara til Havnar at spæla. Vit hava tosað aftur og fram nú okkurt um mánað, men eg má viðganga, at tað er sera torført hjá mær at taka nakra endaliga støðu, sigur hann.

- Tað er eisini so nógvir lutir, sum spæla inn í hesum. Eg má eisini gera mær sjálvum greitt, hvørjar ætlanir mínar eru fyri framtíðina, og her hugsi eg sjálvandi fyrst og fremst um úøbúgvingarmøguleikar. Tí fer ein møguligur sáttmáli neyvan at fevna um meira enn eitt ár, men sum sagt, so havi eg ikki enn tikið nakra endaliga støðu, men tað verður allar helst nakað skjótt, sigur Hjalgrím Elttør at enda.



# Í Býin

Fríggjakvøldið
Happy Hour
23.00-24.00

Diskotek við
Martin Kjærbo

BAROK

Leygarkvøldið
Siggi & Keith
undirhalda við
tónleiki í Shanghai

Happy hour
23.00 - 24.00

Siggi & Keith

Bíleggið borð á
telefon 223000 ella
457680

Shanghai

fk Matseðilin

Hósdagin 29. nov.:
Kálvafrikassé

Fríggjadagin 30. nov.:
Høsnarungar

Leygardagin 1. des.:
Oksasteik

Mánadagin 3. des.:
Kjøtbollar í karrysós

Týsdagin 4. des.:
Knettir

Mikudagin 5. des.:
Brúnt kál og flesk

***

Seinnaparts-
TILBOÐ
frá kl. 14.00:

Juniorburgari 19,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 25,00

Matstovan
í Hoyvík

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681

Fríggjadagin 23. november
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
• Sjavskapping kl. 19.00
• uml. kl. 24.00 Undirhald
v/ Siggi & Keith

UNDIRHALD

Leygardagin 1. desember
• Opið frá kl. 22.00-04.00
• Dansur frá kl. 24.00
Njál & C/o spæla



HESA VIKUNA

Hóskvøldið
DJ Marjon Petersen

Fríggjakvøldið
ladies night DJ Eyðfinn Drewsen

Leygarkvøldið
DJ Eyðfinn Drewsen

Fótbóltur á stórskíggja

Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur
v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,–

Discoteque
Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo



petur & petur • 320870

fríggjakvøldið 30/11 Ólavur Øster
BAND
Diskotek

leygarkvøldið 01/12 Ólavur Øster
BAND
Diskotek

20 ára aldursmark

PLATFORM
discoteque

Casablanca
Ristorante

Hugnalig nýggj
Italiensk matstova

Vel millum 30 fjølbroyttar:
Forverðar, suppur,
pasta, pizza,
fiskaverðar, kjøtverðar,
barnamenu og dessertir

Opið er
Mánadag - hósdag
1700-2230
Fríggjadag & leygardag
1700-2400
Sunnudag
1230-1500
1700-2230

Borðbílegging á tlf. 319696

Casablanca
Ristorante

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil
- ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

Hafnia
Lounge
Frá nú av fram til jóla
hava vit m.a.
Gløgg kr. 30,-
Eplaskivur kr. 15,-
Stór vafla við róma
og súltutoy kr. 15,-
Kaffi við dagsins
køku kr. 38,-
Størri úrval á menukorti
Opið frá kl. 14.00
Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50

NÁTT-
BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið :

• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík
og Kollafjørð eftir avtalu)

Onnur kvøld kann
koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

Felagið
Tórshøll
Hetta
vikuskiftið
spæla
TEY AV
KAMARINUM
Hvørt fríggjakvøld,
leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur

Leygarkvøldið 1. des.
verður jólaborðhald
kl. 20.00

Seinasta freist at tekna
seg er í kvøld

Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

BÝIN
HVØNN HÓSDAG